ítróttur

Nr. 133 • hósdagur • 15. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Trupul uppgáva hjá B36

B36 kemur á eina trupla uppgávu í kvøld, tá ið teir skulu leika UEFA-Cup dyst ímóti lettiska liðnum Metalurgs á Tórsvølli. Lettiska liðið liggur á odda í heimligu kappingini í løtuni og hevur skorar í miðal trý mál í hvørjum dysti

UEFA-CUP

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Árstalsfelagið úr Havn skal dystast við lettiska liðið Metalurgs, sum í løtuni liggur ovast í lettisku kappingini, eftir at 14 umfør eru leikt. Annars hevur høvuðsstaðarfelagið Skonto Riga verið at kalla ein lettiska landsliðsleikara, Zirnis, ið júst hevur verið við til EM-endaspælið í Portugal. Harafturat er onkur russikur leikari eisini einaráðandi í lettisku kappingini í mong ár, men nú tykist Metalurgs av álvara at hótta siðvanda felagið úr Riga.

Fara eftir sigrinum

Venjarin hjá B36, Jóannes Jakobsen, sigur, at tað uttan iva verður torført hjá havnarliðnum, men tað skal eingin ivi verða um, at B36 fer eftir sigrinum í dystinum í kvøld. Í B36 hava tey roynt at fingið ymiskar upplýsingar um Metalurgs, men tað hevur verið trupult. Tó vita tey í árstalsfelagnum, at liðið liggur á odda í kappingini í Letlandi,k og at liðið hevur ein litaviskan landsliðsleikara, umframt ein lettiska landsliðsleikara, Zirnis, ið júst hevur verið við til EM-endaspælið í Portugal. Harafturat er onkur russikur leikari eisini á liðnum. Roynt var at fáa hendur á einum sjónbandi av lettiska liðnum, men tað vísti seg at verða ógjørligt, sigur Jóannes Jakobsen. Venjarin hjá B36 væntar tó, at talan er um eitt tekniskt gott lið við fleiri stórum leikarum, og at Metalurgs spælir skjótan fótbólt. At lettiska liðið spælir álopsfótbólt er tað nógv, sum bendir á, tí liðið hevur skorað ikki færri enn 42 mál í teimum 14 dystunum. ið teir hava leikt í lettisku kappingini í ár. Sunnudagin leikti Metalurgs ímóti kappingarneytunum úr Riga á útivølli, og tann dystin vunnu mótstøðumenninir hjá B36 2-0. Undan tí dystinum hevði Metalurgs leikt ímóti mótstøðuliðnum hjá B68, Ventspils, og tá vann Metalurgs heili 4-0, so teir tykjast verða væl fyri.

B36 hevur alt sítt fólk tøkt til dystin í kvøld, og tað er óivað gleðiligt fyri venjaran, serliga tí at ein av berandi kreftunum á liðnum, Pól Thorsteinsson, sum eisini hevur drúgvar altjóða royndir, hevur havt ein skaða at dragast við í seinastuni. Jóannes Jakobsen letur eisini væl at seinastu venjingunum undan UEFA-Cup dystinum í kvøld. - Eg haldi, at leikararnir hava verið stak góðir undir venjing seinastu dagarnar, og teir tykjast hava tann rætta hugburðin til uppgávuna, ið liggur fyri framman, sigur hann.

Ov lítla tíð á grasi

B36 hevur vant tríggjar ferðir á grasi undan dystinum, men tað er ikki nøktandi, heldur Jóannes Jakobsen. Eftir hansara tykki er tað alneyðugt, at føroysku feøgini, sum skulu luttaka í altjóða dystum, fáa høvi til at venja regluliga á grasi, um tey skulu hava nakran møguleika at gera seg galdandi í hesum dystum. Sunnudagin leiktu B36 og B68 venjingardyst á grasinum á Svangaskarði, og tann dystin vann havnarfelagið 3-2.

Venjarin hjá B36 kann fegnast um, at ein av berandi kreftunum á liðnum, Pól Thorsteinsson, nú er við aftur eftir ein skaða

savnsmynd

Jóannes Jakobsen sigur seg vóna, at hansara leikarar fara at hava lætt við at umstilla seg til at spæla á grasið, tí tað er væl tyngri enn at leika á graslíki, og tí kann orkan fara at ganga undan, so hvørt sum dysturin líður. Dysturin millum B36 og Metalurgs verður á Tórsvølli í kvøld klokkan 19.

Allir skulu spæla upp til sítt besta

Toftamenn, ið liggja aftast í heimligu kappingini, leika í kvøld UEFA-Cup dyst ímóti lettiska liðnum Ventspils, ið hevði ikki færri enn tríggjar leikarar í lettiska EM-hópinum

UEFA-CUP

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Tað verður ikki við høvuðsvenjaranum, Trygva Mortensen, við róðurspinnin, at B68 fer undir eina tí truplastu uppgávuna leingi, tá ið lettiska liðið Ventspils vitjar á Svangaskarði í kvøld. Áðrenn Trygvi tók við venjarasessinum í B68, hevði hann bílagt sær eina ferð saman við familjuni, og tí er tað hjálparvenjarin, Edmund Jacobsen, ið skal taka sær av liðnum hjá toftamonnum í kvøld.

Nógvir mangla

Tað hevur verið ein stórur trupulleiki hjá B68 í ár, at teir ikki hava havt so nógv fólk, og støðan undan dystinum í kvøld er heldur ikki nakað undantak í so máta. Tríggir mans verða heilt vist ikki við, meðan tríggir aðrir eru ivasamir. Tað er greitt, at bæði brasiliumaðurin Alex og veteranurin Jákup Eli Olsen ikki fáa leikt vegna skaða, og Øssur Jacobsen verður heldur ikki við, tí at hann er uttanlanda. Harafturat er stórur ivi um Mikkjal Thomassen, tí at hann hevur trupulleikar við hælsinuni. Eisini teir báðir Bogi Petersen og Mortan Hansen verða neyvan at síggja á vøllinum í kvøld, men tað er tó ikki avgjørt enn.

Øssur Hansen er uttan iva tann spælarin hjá B68, sum hevur flest altjóða royndir, og tí kemur nógv at hvíla á honum í kvøld, tá ið toftamenn skulu dystast við lettiska Ventspils.

savnsmynd

Hinvegin kann Edmund Jacobsen fegnast um, at pappírini hjá brasilumanninum Anderson nú eru komin í rættlag, og hann hevur undir venjing víst, at hann er ein styrkur fyri liðið, sigur hjálparvenjarin hjá B68. Eisini bulgarski áleyparin, Stankov, er komin fyri seg eftir skaða, og hann verður millum teir fyrstu ellivu í kvøld, sigur Edmund Jacobsen. Hin nýggi brasiliumaðurin hjá B68, Fabricio, verður tó ikki við, tí pappírini hjá honum eru enn ikki komin í rættlag.

Fara eftir einum javnleiki

Útgangsstøðið hjá B68 í kvøld verður at fáa ein javnleik, sigur Edmund Jacobsen og leggur afturat, at um tað skal eydnast, er neyðugt, at allir leikararnir hjá toftamonnum spæla upp til sítt allarbesta. Hansi sigur, at tað verður umráðandi hjá B68 at hava so nógv mans sum gjørligt aftan fyri bóltin, tá ið lettarnir leypa á, so at Ventspils ikki fær pláss til at spæla sítt spæl. Hinvegin verður tað eisini av stórum týdningi, at tað fer nógv fólk fram við, tá ið B68 fer í álop. Edmund Jacobsen sigur, at hetta krevur sjálvsagt, at allir mans gera ein stóran arbeiðsinnsats, og sum venjingarnar hava verið seinastu dagarnar, er hann heldur ikki í iva um, at tað ber til.

B68 hevur ikki nógv fólk við altjóða royndum, og tí kemur óivað nógv at hvíla á herðunum hjá liðskiparanum, Øssur Hansen, sum hevur drúgvar altjóða royndir frá sínari tíð á føroyska a-landsliðnum. Tað eru tó fleiri av yngri leikarunum hjá B68, sum hava nakað av royndum frá ymiskum ungdómslandsliðum, og tær royndir kunnu eisini koma væl við í kvøld. Dysturin á Svangaskarði í kvøld verður klokkan 19.

Svimjing um Nólsoyarfjørð

TÍÐINDASKRIV

Ovastevnan 2004 verður vikuskiftið 6. til 9. august í ár. Fastur táttur seinastu 6 árini, hevur verið, at motiónistar og kappsvimjarar royna roysni at svimja teir 4 kilometrarnar úr Havn til Nólsoyar.

Sjálvsagdur partur í Ovastevnuni, er at svimja um Nólsoyarfjørð. Upprunin til stevnuna er lyfti Ova Joensen, sála, at fáa nólsoyingum til vega svimjihyl. At hesin navnframi maður, lat lív á sjónum, er enn ein staðfesting, hvussu týdningarmikil partur svimjingin er fyri fólki, ið býr á hesum klettum.

Leygardagin 7. august 2004 kl. 10 standa svimjarar klárir at leypa á bláman yviri við Strond. Eins og undanfarnu árini sýna radioamatørarnir stuðul, at hýsa svimjarunum í fyrireikingunum, áðrenn farið verður oman til Stóradamm.

Fyri framman eru 4000 metrar at svimja, hjá teimum svimjarunum, ið svimja beint á bygdina. Er onkur, ið kemur á land aðrastaðni á oynni, er at skunda sær at renna til Heiðursportrið, tí har er málið - og besta tíðin higartil er 1 tími, 20 min. og 27 sekund, metið hevur Dia Jacobsen sett í 2001. Ógvuliga ymiskt er hvussu skjótt svimjararnir eru komnir um fjørðin. Frá metinum hjá Dia Jacobsen, er glopp aftur til 2 tímar 32 minuttir og 28 sekund og skuldi tað kunna boðið øllum at tikið lut.

Trygdin verður sett høgt í hesum tiltaki og hava samarittarnir aftur í ár játtað at standa til reiðar. Sjálvbodnir nólsoyingar standa eisini á landi og taka ímóti, eins væl og at báðir partar eru tøkir á sjónum - í hjálparbáti.

Men stóran leiklut eigur svimjarin sjávlur, tí í tilmeldingini, skal svimjarin fáa sær til vega froskmanna- ella triatlonbúna, seksmannafar (ella størri maskinbát), tvey vaksin hjálparfólk og VHF í bátinum - og sjálvsagt hampiliga venjing.

Størsta luttøkan var fyrsta árið (1998), tá ið 14 luttakarar lupu á bláman yvir við Strond og vunnu upp land í Nólsoy. Vónin er, at nógv meldað til, í hesum árliga møguleikanum at royna seg tvørtur um Nólsoyarfjørð.

Áhugaðir svimjarar, skulu venda sær til Jákup av Skarði. Best er at skriva til jakupavs@skulin.fo ella senda sms til tlf. 217001. Eru spurningar ber eisini til at ringja 217001. Eftir 28. juli verður Erlendur Simonsen (stigtakarin) at hitta á tlf. 220644.

Heitt verður á svimjarar at hava navn/upplýsing um bát og hjálparfólk, tøk, tá ið meldað verður til.

Við vón um góða svimjing og góða Ovastevnu.

Stuðulsnevndin fyri Svimjihyli í Nólsoy.

Hendan myndin er tikin eftir svimjingina í fjør av trimum teimum fremstu svimjarunum um Nólsoyarfjørð

Rætting til grein um 10-mannaførini

Í blaðnum í gjár kundi lesast, at um so verður, at Havnarbáturin og Nósoyingurin verða javnir í stigum eftir ólavsøkuróðurin, og hvørgin teirra vinnur, so hevur Nólsoyingurin fyrimun, tí teir hava vunnið fleiri FM róðrar ígjøgnum árið, enn Havnarbáturin.

Hetta er tó **ikki** rætt. Tað stendur nevniliga í kappingarreglunum, at um so er, at tveir bátar enda sum nr 1 í FM kappingini, og sostatt eru javnir í stigum eftir ólavsøkuróðurin, so vinnur tann báturin, sum vinnur á ólavsøku. Vinnur hvørgin báturin, verður tann báturin meistari, sum fær bestu plaseringina á ólavsøku.

Verða bátarnir javnir í stigum eftir ólavsøkuróðurin, t.d. um Havnarbáturin gerst nr 2 og Nólsoyingur nr 4, vinnur Havnarbáturin sostatt meistaraheitið, tí tað er plaseringin sum telur. At Nólsoyingur hevur vunnið fleiri FM-róðrar hevur einki at siga tá.

"Stendur á jøvnum millum fleiri bátar, tá ið stevnurnar eru av, er tann vinnari, sum varð best plaseraður, seinasta FM-róður í kappingarárinum" (reglugerðin fyri føroyameistaraheitið í kappróðri, stk 22)

Haldið mær tilgóðar.

-eys-